# Statoil í hektiskum útbyggingum

**Við virksemi í 28 londum framleiðir heimsins triðstørsti veitari av ráolju meira enn eina millión tunnur um dagin – men menningin heldur fram í høgum tempo**

OLJA & GASS

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Sum operatørur í 12 útbyggingar og broytingar prospektum á tí norska landgrunninum er menningar taktin høg í heimsins triðstørsta oljufelag, Statoil. Tann stóra tøknifrøðiliga menningin gevur effektivari útvinning og betri tillaging eftir umhvørvinum, segði Erling Øverland, virkandi forseti og Chief Executive Officer, við altjóða tíðindamiðlar herfyri.

Eins og fleiri aðrir leiðandi persónar innan olju- og gassídnaðin hava gjørt í seinastuni, vísti Erling Øverland á at gass fær ein alsamt vaksandi týdning. Samstundis peikaði hann á stór og nýfunnin tilfeingi uppi í teimum norðaru umráðunum í Norska Havinum og Barentshavinum.

»Vit eru eitt integrerað olju- og gassfelag við sterkari fokusering á leiting og framleiðslu,« segði Erling Øverland undir einum kunningartiltaki í Stavanger.

»Vit hava tilfeingi, førleika og tøknifrøði,« helt hann fram. »Vit eru ídag heimsins triðstørsti veitari av ráolju, hava virksemi í 28 londum, 20 operatørskap í Noreg og 19.300 fólk í starvi; vit framleiða eina góða millión tunnur um dagin og eiga 4,3 milliardir tunnur á goymslu, og vit marknaðarføra tveir triðingar av øllum norskum nøgdum av gassi.«

»Men fyrsti suksess faktor er ein tryggur rakstur. Tey seinastu 15 árini hava vit megnað at økt trygdina hjá okkara arbeiðsfólki soleiðis at skaða tilburðir eru fækkaðir munandi. Vit skulu halda fram á hesari kós at bøta um trygdina.«

Sum faktor nummar tvey fyri suksess peikaði Statoil ovastin á rakstrarligan vinning.

»Orskað av dyggiligum ábótum teljast vit framvegis millum tey bestu í okkara ídnaði,« viðmerkti hann og vísti upp grafar; sambært hesar liggur lønsemið hjá Statoil á einum triðja plássi, einans aftan fyri ExxonMobil og Total.

Málini hjá Statoil fyri 2007 eru at økja bæði framleiðsluna úr 1,12 upp í 1,35 milliónir tunnur um dagin og miðal avkastið av upptiknum kapitali úr 12 upp í 12,5 prosent.

»Strategiin er í stuttum: at betra um virðisskapanina á tí norska landgrunninum, at økja um altjóða leitingar og framleiðslu virksemi, at byggja eina europeiska gass positión, og at dýpa og styrkja foredling og marknaðarførslu.«

Statoil varð stovnað í 1972 sum eitt reint statligt felag men varð børslistað í 2001. Í dag sita institutionellir íleggjarar so sum peningastovnar og eftirlønargrunnar á umleið 20 prosentum av partapenginum meðan tann norski staturin eigur umleið 80 prosent. Tann samlaði árligi umsetningurin liggur um 240 milliardir norskar krónur og avlopið fyrra árið var góðar 16 milliardir.



*Erling Øverland, virkandi forseti og Chief Executive Officer, Statoil.*
*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

## Snøhvit størst

Tær fimm størstu verkætlanirnar sum Statoil tekur lut í tey næstu árini eru Ormen Lange, Snøhvit, Langeled, Kristin og Kvitebjørn. Ormen Lange og Snøhvit eru nógv tær størstu av hesum verkætlanum og Ormen Lange gerst enn størri av at Langeled kemur afturat sum eitt forleingilsi. Sæð við Statoil eygum er tó Snøhvit største projekt, eftirsum parturin hjá Statoil er lutfalsliga størri har.

Tøkniliga flytir Snøhvit eisini mørk. Verkætlanin byggir fyri ein stóran part á gransking gjøgnum tey seinastu 20 árini innan sokallaða fleirfasu tøknifrøði, og Statoil telist millum fremstu feløg í heiminum á hesum øki. Fleirfasu tøknifrøðin, sum snýr seg um at kunna flyta olju, vatn og gass óviðgjørt gjøgnum somu rørleiðingar yvir langar teinar, hevur gjørt tað møguligt at byggja út Snøhvit gassfeltið uttan fyri Hammerfest. Hetta hongur saman við teimum stóru kostnaðarsparingum ið kunnu vinnast við hjálp av hesari tøknifrøði – Statoil er soleiðis sloppið undan at seta upp eina mannaða installatión úti á feltinum.

Havbotn loysnin við Snøhvit byggir á at ein 175-kilometur long rørleiðing skal flyta tann óviðgjørda brunnstreymin av gassi, kondensati, vatni og kolvetni upp á land. Hetta hevur inniborið nýskapan í og við at dagsins tøknifrøðiliga mark fyri longd av rørleiðingum av hesum slag liggur um 100 kilometrar.

Á granskingar miðstøðini hjá Statoil í Tróndheimi er nógv arbeiði gjørt fyri at skilja hvussu fleirfasu streymingar uppføra seg undir ymiskum villkorum, og hvussu tað er møguligt at fáa eina sum mest forútsigiliga og javna streyming gjøgnum rørleiðingarnar.

»Fleirfasu tøknifrøðin er ein virðismikil førleiki vit kunnu hava við okkum í okkara internationalisering,« segði Ingve R. Theodorsen, stjóri á granskingar miðstøðini.

»Tøknifrøðin kann brúkast víðari í teimum norðaru umráðunum. Eg síggi einki til hindurs fyri einari útbygging á havbotninum við tilhoyrandi fleirfasu flutningi á tí stóra gassfeltinum Stokmanovskaya russisku megin í Barentshavinum.«

Granskingarstjórin vildi heldur ikki útiloka at umhvørvislig krøv kunnu føra til at olju- og gassídnaðurin má finna alternativ til tær vanligu loysninar hvat útbyggingum viðvíkur.



*Inni á einum av verkstøðunum hjá Aker Kværner í Tranby uttan fyri Oslo.*
*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

# Byggja útbúnað til boring fimm kilometrar undir havbotninum

**Aker Kværner byggir millum annað djúpvatns undirsjóvar borieindir ið kunnu standa ímóti extremum trýsti upp á 900 bar í 170 hitastigum**

FRÁLANDAVINNA

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Eitt navn gongur ofta aftur tá tað snýr seg um byggitøkni og verkfrøði fyri olju- og gassvinnuna: Aker Kværner; hetta norska felag er ein leiðandi globalur veitari av verkfrøði og byggitænastum, tøknifrøðiligum produktum og integreraðum loysnum. Tá vit herfyri vitjaðu ein stálverkstað hjá Aker Kværner, í Tranby nakað uttan fyri Oslo, framgekk tað at hesin partur av felagnum millum annað spesialiserar seg í djúpvatns arbeiði fyri olju- og gassídnaðin, og arbeiðir við tøkniliga sera avbjóðandi uppgávum.

»Frálanda borieindir til grunt vatn hava ikki tann stóra áhugan her,« segði Mads Andersen, Executive Vice President Products & Technologies. »Tá kunnu onnur gera arbeiðið líka so væl sum vit og kanska bíligari eisini. Tað er øðrvísi við djúpvatns tøkni; har er tað ikki so lætt hjá øðrum at kopiera okkum, og hetta er eitt øki vit hava specialiserað okkum í… Trýstið á djúpum vatni setir serlig krøv til alla útgerð ið verður installerað har niðri, og vit hava lagt okkum eftir at klára tey krøvini - hetta gera vit millum annað við hjálp av at kombinera framkomna tøknifrøði við innovativt design og góða byggitøkni.«

Millum teir stóru kundarnar innan djúpvatns borieindir roknast Statoil, og í framleiðslu beint nú eru undirsjóvar eindir til millum annað útbyggingina av Snøhvit feltinum. Samstundis verða undirsjóvar framleiðslu eindir framleiddar til menningina av 'Kristin' gasskelduni ið liggur 5 kilometrar undir havsins botni; útbúnaðurin er heimsins mest krevjandi og skal klára at arbeiða uttan trupulleikar í 170 hitastigum og móti einum trýsti upp á 15.000 psi (pund per kvadrat tumma).

Statoil er størsti partnari og operatørur í menningini av Kristin. Reservoirið varð funnið í 1997 og skal goyma upp á 35,4 milliardir kubikkmetrar av gassi umframt 8,5 milliónir tons av flótandi natúrgassi og 40,4 milliónir kubikkmetrar av kondensati. Men alt hetta liggur langt undir djúpum vatni og havbotni. Tað inniber at útbúnaður til boring og annað má klára trýst upp á 900 bar í temperaturum upp á 170 stig C - sum er hægri enn í nøkrum øðrum felti higartil útbygt út fyri norsku strondina. Kristin skal eftir ætlan útbyggjast gjøgnum 12 undirsjóvar framleiðslu brunnar, og sáttmálin hjá Aker Kværner við Statoil vegna hesa undirsjóvar skipan er verdur umleið 600 milliónir krónur.

Nógv størri er tó sáttmálin hjá Aker Kværner við Statoil um Snøhvit útbyggingarnar á Mjólkoynni uttan fyri Hammerfest í norðasta Noreg; tann ordrin er mettur til meira enn 1,5 milliardir krónur og skal verða liðugt leveraður við árslok 2005. Føroyingar kenna eitt sindur til Aker Kværner í hesum sambandi, nevniliga í og við at dóttirfelagið Aker Stord nýliga undirskrivaði sáttmála við Atlantic Airways um flúgving av starvsfólki í sambandi við útbyggingarnar av Snøhvit feltinum. Aker Stord er savningarsmiðja fyri modul og yvirpartar av føstum og flótandi olju- og gass-framleiðslu pallum, við ábyrgd av sokallaðum multi discipline og mekaniskum byggisáttmálum fyri olju og gass verksmiðjur á landi í Noreg. Innan avtøku av offshore bygnaðum hevur Aker Stord serliga ábyrgd fyri metodum og útførslu í burturbeining av yvirpørtum.

Millum aðrar aktuellar stórordrar hjá Aker Kvaernar kann roknast ein sáttmáli í sambandi við útbyggingarnar av heimsins størsta djúpvatns undirsjóvar felti, Dalia, út fyri angolsku strondini. Hesin ordri er verdur umleið tvær milliardir krónur og umfatar EPC (Engineering Procurement & Construction) og ein trý ára tænastu sáttmála.

Eisini tá tað snýr seg um bygging av betong segmentum til frálanda móttøkustøðir fyri flótandi natúrgass, verður Aker Kværner roknað sum leiðandi á altjóða marknað-inum. Herfyri kallaði ChevronTexaco í einum tíðindaskrivi Aker Kværner fyri »ein viðurkendan heimsleiðara innan GBS (Gravity Based Structure) tøknifrøði við meira enn 30 ára royndum innan GBS design og bygging fyri olju- og gassídnaðin.«

Tilsamans umleið 22.000 fólk starvast hjá Aker Kværner í meira enn 30 londum, og tann árligi umsetningurin liggur um 35 milliardir krónur. Herfyri varð samtykt á aðalfundi at góðkenna ætlanirnar um at strukturera og fokusera bólkin av nýggjum. Úrslitið er tveir fokuseraðir ídnaðarligir bólkar: Aker Kvaerner og skipasmiðju bólkurin Aker Yards, hvør leiðandi á sínum øki, undir einum felags ídnaðarligum móðurfelag, Kvaerner. Felagið varð nýliga skrásett á partabræva marknaðinum í Oslo.

Aker Kværner er eisini kent í Føroyum gjøgnum høvuðseigaran í móðurfelagnum, Kjell Inge Røkke, sum fíggjar royndarvirkssemið hjá trolaranum Næraberg, Klaksvík.



*Djúpvatns eind til Kristin útbyggingina undir menning í testbrunni hjá Aker Kværner.*
*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*